


## Út í rúmdina við ferðafólki

Gongst, sum miljarderurin Richard Branson ætlar, sleppa ferðafólk út í rumdina í rúmdarferjuni Virgin Galactic um hálvt annað ár. Eftir ætlan skal rúmdarferjan flúgva ferðafólk út í rúmdina. Virgin Galactic fer at hava pláss fyri tveimum flogskiparum og seks ferðafólkum. Sagt verður, at umleið 300 ferðafólk longu hava bílagt sær ferðaseðil, og hetta eru ikki bíligir ferðaseðlar. Tað fer at kosta hvørjum einstøkum ferðandi 200.000 dollarar – ella meira enn eina miljón krónur – at sleppa út í rúmdina við Virgin Galactic. Øll verkætlanin hjá Richard Branson sigst kosta umleið 2,6 miljardir krónur. Væntandi er, at fyrsta rúmdarferðin kann fremjast um 18 mánaðir, og ferjan er á stødd við ein minibuss.

# Aftur rok um Listasavnið

**Tað kann gerast ein vanlukka fyri Listasavnið, at leiðarin Helgi Fossadal nú sleppur at halda fram, halda yrkisfólk í listaumhvørvinum, sum í dag hava sent út alment mótmæli. Stýrið fyri savnið skilur ikki trupulleikan og heldur sitandi leiðaran hava gjørt eitt sera gott arbeiði fyri Listasavnið**



– Vit vildi ikki enda í tí støðu, at ongin søkti starvið, tí tað bara er fyri eitt ár, sigur Martin Næs, formaður í stýrinum fyri Listasavnið, nú stýrið hevur longt setanina av Helga Fossadal sum leiðara á Listasavnunum



– Tað mátti verið vert at risikera, at ongin søkti starvið, um man veruliga vildi hava eitt fólk við listafakligari útbúgving, sigur Hansina Iversen, formaður fyri Heystframsýningarbólkin, sum í fimm ár hevur mótmælt setanina av ófaklærda leiðaranum á Listasavninum

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Onkur var longu í ferð við at skriva umsóknina til starvið sum leiðari á Listasavni Føroya. Og onnur í føroyska listaumhvørvinum høvdu somu ætlan. Ongin ivaðist nevniliga í, at starvið fór at verða lýst leyst fyrsta dagin, nú fimm ára skeiðið hjá umstrídda leiðaranum, Helga Fossadal, er við at vera av.

Men ongin starvslýsing kom. Í staðin kom ein fráboðan frá stýrinum fyri savnið um, at sitandi leiðarin heldur fram í starvinum fram til 1. mai 2011, meðan arbeitt verður við bygnaðarbroytingum fyri savnsøkið. Sambært stýrisformanninum fyri Listasavnið, Martini Næs, vil stýrið hava Helga Fossadal við í arbeiðið at skipa Listasavnið undir einum felags Tjóðsavni, sum ætlandi verður veruleiki í 2011.

### Álitisbrot

Sostatt verður tað ikki í hesum umfari, at føroyska listaumhvørvið aftur kann savnast kring Listasavn Føroya. Sum kunnugt mótmæltu tey flestu av føroysku yrkislistafólkunum harðliga setanina av Helga Fossadal í 2005, tí setanin ikki fylgdi kravinum um, at leiðarin skuldi hava listafakliga útbúgving. Síðani tað hava tey flestu av teimun nokta at sýnt fram á Listasavninum, og hava tey í staðin tikið seg saman í Heystframsýningarbólkin, sum til seinastu framsýning taldi 17 føroysk myndlistafólk.

Øll hesi árini hava tey tó sett sítt álit á, at ein loysn fór at koma, tá fimm ára starvsskeiðið hjá umstrídda leiðaranum fór at vera úti 1. mars 2010.

– Hetta er eitt so dygt álitisbrot, at eg havi ikki orð fyri tí, sigur Inger Smærup Sørensen, listfrøðingur og samskipari hjá Heystframsýningarbólkinum og vísir millum annað til drúgt samskifti, sum bólkurin hevur havt við Stýrið fyri Listasavnið og Mentamálaráðið um støðuna hesi árini.

– Í einum javnum streymi av brøvum, hava vit víst á, at um tað ikki skjótt verða listafaklig kriteriu, sum leggja støðið fyri virksemið á Listasavninum, so endar tað við eini vanlukku. Nøkur beinleiðis lyfti hava vit ikki fingið, men vit hava avgjørt fingið fatan av, at vit fóru at vera hoyrd á onkran hátt. Men vit eru ikki so frægt sum kunnað um avgerðina, sigur ein sera skelkað Inger Smærup Sørensen.

### Ikki skyldu at kunna

Hóast hann harmast reaktiónina hjá listfrøðinginum, dugir stýrisformaðurin ikki at síggja, hvussu stýrið skal hava framt nakað áltisbrot í hesum sambandi.

– Vit halda ikki, at okkum nýtist at kunna hvønn einstakling um okkara ætlanir og avgerðir. Eg geri hetta uppá mín máta, og eftir mínum tykki var tað rætt at biðja Helga Fossadal halda fram sum leiðari, sigur Martin Næs, og leggur afturat, at stýrið heldur, at Helgi Fossadal hevur gjørt eitt sera gott arbeiði á Listasavninum higartil.

Spurdur, um hann við hesum velur at ignorera áralangu spjaðingina í føroyska listaumhvørvinum, sum setanin av sitandi leiðara hevur verið orsøk til, sigur Martin Næs

– Nei, eg ignori tað ikki, men nú velji eg at hyggja 100 ár fram í tíðina heldur enn fimm ár aftur.

Hví tað júst skal vera umstríddi leiðarin, sum nú skal ganga á odda inn í framtíðina hjá Listasavninum hevur Inger Smærup Sørensen ilt við at síggja tað meiningsfulla í.

– Vit vita, at undir verandi leiðara hevur virksemið á savninum ikki livað upp til sjálvt tey minstu fakligu og professionellu krøv, ið vanliga verða sett einum slíkum savni. Tí fati eg heldur ikki, hví stýrið og mentamálaráðið halda tað vera best, at hann heldur fram. Tú ført illgruna um, at her ganga onkur persónlig áhugamál fram um tey listafakligu, og tað kann verða til óbótaligan skaða fyri ikki bara Listasavnið men fyri føroyska listasøgu yvirhøvur, sigur Inger Smærup Sørensen.

### Kann draga út

Eisini Hansina Iversen, formaður fyri Heystframsýningarbólkin, hevur ilt við at skilja avgerðina um at lata Helga Fossadal ganga á odda í arbeiðinum at skipa Listasavnið undir einum Tjóðsavni. Til ta tíð kann Helgi Fossadal kortini ikki halda fram í starvinum, tí undir Tjóðsavninum verður tað nevniliga eitt aðalkrav, at leiðarin á Listasavninum skal hava listafakliga útbúgving.

– Tí mátti tað verið upplagt at brúkt høvið til nú beinanvegin at seta eitt fólk við listafakligari útbúgving sum leiðara, sum eisini nettup kundi verið við í fyrireikingini av fakliga grundaðu deildunum undir Tjóðsavninum, heldur hon.

Til hetta sigur stýrisformaðurin, at stýrið helt tað vera óneyðugt at brúka tíð uppá at seta eitt starv, sum allíkavæl skal lýsast leyst aftur um eitt ár, tá hini deildarleiðarastørvini á savnsøkinum eisini verða lýst leys.

– Eisini ivaðust vit stórliga í, um nakar fór at søkja eitt slíkt eitt-ára starv, og tí støðu vildu vit helst sleppa undan, sigur Martin Næs.

– Tað mátti verið vert at risikera, um man veruliga vildi hava eitt fólk við listafakligari útbúgving í starvið, so hatta ljóðar sum ein vánalig umbering, heldur Hansina Iversen.

Sjálv kennir hon fleiri, sum ætlaðu at søkja starvið. Hartil kundi stýrið væl bara latið nýggja leiðaran hildið fram í starvinum undir Tjóðsavninum, heldur hon.

– Jú, tað kundu vit kanska gott. Men nú hava vit so valt hetta, sigur Martin Næs.

Hann leggur afturat, at beint nú er tað eisini heldur ógreitt, um ætlanin við at skipa Listasavnið undir einum Tjóðsavni verður egg ella ungi.

Hetta er eisini tað, sum av álvara fær Hansinu Iversen at stúra, tí tað kann merkja, at tað fer at draga enn longur út at fáa eitt listafakliga útbúgvið fólk í starvið. Arbeiðið at skipa eitt Tjóðsavn kann nevniliga taka drúgva tíð, vísir hon á.

– Tí er tað í prinsippinum eisini ógjørligt at vita, hvussu leingi hendan longda setanin av Helga Fossadal kemur at vara. Tá stýrið soleiðis uttan nakað kundi leingja setanina hesuferð, er tað væl onki, sum forðar teimum í at gera tað einaferð afturat, sigur Hansina Iversen.